# VIT KUNNU BÍÐA – MEN IKKI OV LEINGI

**KOMMUNA** – Vit høvdu ikki væntað at fáa játtandi svar soleiðis beinanvegin. Men vit hava kortini ikki sett okkum hendur í favn, tí vit mugu og skulu finna eina skilagóða loysn á skúlamálinum, sigur Albert Ellefsen, borgarstjóri í Vága kommunu. - Mugu vit bíða, so bíða vit eitt sindur, men ikki ov leingi.



Orð: Snorri Brend

Giljanes: - Vit mugu bara geva tol, tí ein loysn má finnast so ella so, slær hann fast. - Vit fara á fundi við Fíggjarmálaráðið mánadagin at tosa afturm støðuna.

Í eina tíð hevur kommunan arbeitt við eini ætlan at byggja nýggjan skúla á Giljanesi, ístaðin fyri tann 50 ára gamla skúlan ið liggur millum Miðvág og Sandavág.

Í fjør varð soppur staðfestur í skúlanum, og tí er hann óegnaður sum arbeiðsstað hjá bæði næmingum og lærarum.

Henda veruleikan kann eingin liva við, og tí hevur kommunan arbeitt við at finna eina endaliga loysn í skúlamálinum.

Og tann skilabesta loysnin er hon, at byggjast skal ein nýggjur skúli sum er mettur at kosta 60 mió krónur íalt.

Av hesum varð mett, at fyrsta byggistig hevði kostað 42 mió. Spurningurin er so, um ella nær tey sleppa at fremja hesa neyðugu íløguna í verki.

## Klárt

Arbeiðið við tí nýggja skúlanum var annars komið so mikið langt, at forprosjektið er gjørt og skitsurnar klárar.

– Tað er í roynd og veru klárt at fara undir detail-prosjekteringina, vísir Albert Ellefsen á. Sambært ætlanini verður mett at byggingin av nýggjum skúla fer at taka eini tvey ár.

Hetta verður kortini ikki veruleiki í fyrsta umfari, tí kommunan fær altso ikki loyvi til at átaka sær 42 mió krónur aftrat í skuld.

Fyrsta byggistig varð mett at kosta hesa upphæddina. Men hetta hevði samstundis ført við sær, at nettoskuldin hjá kommununi fer 40 prosent upp um eina álíkning.

Og tað er her at Fíggjarmálaráðið sigur stopp.

– Tað skulu heilt serligar umstøður til fyri at geva undantaksloyvi til slíkt, hevur Terji Petersen, ráðgevi í ráðnum sagt í grundgevingum sínum.

– Hesar umstøður eru ikki til í hesum førinum, vísir hann á.

Her stendur málið nú, og nú verður bíðað eftir einum fundi millum kommununa og fíggjarmálaráðið í komandi viku.

## Útseting

Fíggjarmálaráðið vísir í sínum grundgevingum á, at tað eisini eru aðrar kommunur við bygningum sum eru í ringum standi, millum annað vegna soppavøkstur.

Hóast Terji Petersen vísir á, at ráðið metir at skúlabygging er ein skilagóð og neyðug íløga, verður ikki givið undantaksloyvi í hesum føri.

– Kommunan kann fremja hesa verkætlanina innan fyri karmar av einari álíkning. Men so má annað raðfestast øðrvísi, ella verkætlanir útsetast, sigur Fíggjarmálaráðið.

Vága kommuna er um at vera liðug við stórarbeiðið at gera nýggjan dagstovn í Miðvági.

Hetta arbeiðið er komið so mikið langt, at tað verður ikki steðgað nú. Spurningurin er so, hvat annað kommunan kann gera.

– Tað er sjálvandi altíð ein spurningur, um tað ber til at útseta nakað ella steðga við onkrum øðrum, vísir Albert Ellefsen á.

Hetta fæst helst meiri greiða á mánadagin, tá fundur verður millum kommununa og fíggjarmálaráðið.

snorri@sosialurin.fo




*- Tað hevur skund at fáa bygt nýggjan skúla á Giljanesi, sigur Albert Ellefsen, borgarstjóri í Vága kommunu. Nú verður spurningur settur við, hvørt kommunan fær loyvi at taka lán til eina slíka bygging*

## Kommunuskuld

Nýggi skúlin á Giljanesi fer eftir ætlan at kosta 60 mió krónur íalt.
Ætlanin er tó at gera 1. byggistigið í hesum umfarinum. Tað hevði kostað 42 mió krónur og kundi verið framt eftir tveimum árum.
Ein álíkning hjá Vága kommunu er umleið 54 mió krónur, samstundis sum nettoskuldin er omanfyri 21 mió.
Skattaprosentið í kommununi er 23.